NORÐOYA SPARIKASSI

# Ársfrásøgn 2001



**Sparikassin**
er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

**Avlop sparikassans**
verður – burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

**Í sparikassanum**
eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# Innihaldsyvirlit




| | |
|---|---|
| Um sparikassan | 4 |
| Lykla- og høvuðstøl | 6 |
| Til ábyrgdarar og viðskiftafólk | 7 |
| Árið, ið fór | 8 |
| Ársfrágreiðing | 15 |
| Átekningar til ársroknskapin | 16 |
| Rakstrarroknskapur | 18 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 19 |
| Kapitalflytingar og solvensuppgerð | 20 |
| Peningastreymsroknskapur | 21 |
| Viðmerkingar | 22 |
| Nýttur roknskaparháttur | 26 |
| Silvi kemur | 27 |

NORÐOYA SPARIKASSI

**Ósávegur 1**
**Postboks 149**
**FO-700 Klaksvík**
**Tel. 475000 - Fax 476000**
**www.ns.fo**
**ns@ns.fo**

## Deildir

| | | |
|---|---|---|
| Klaksvíksvegur 77 | Tel. 475000 | Fax 476007 |
| Leirvík | Tel. 443070 | Fax 443372 |
| Norðdepil | Tel. 452030 | Fax 452036 |
| Viðareiði | Tel. 451036 | Fax 451165 |
| Telefon- og faxtænastan | Tel. 319494 | Fax 319454 |
| Kort burturmist eftir avgreiðslutíð | Tel. (0045) 44898929 | |

## Umboðsráð

**Klaksvíkar Kommuna**
Óli Marner Christiansen, Klaksvík
Jógvan Clementsen, Klaksvík
Hilmar Danielsen, Klaksvík
Gullak F. Gullaksen, Klaksvík
Byrger Heinesen, Klaksvík
Søren Ziska Jacobsen, Klaksvík
Anna Maria Joensen, Klaksvík
Eyðálvur Menning Joensen, Klaksvík
Janus Joensen, Klaksvík
Jóhann Joensen, Klaksvík
Karl Heri Joensen, Klaksvík
Magnus Joensen, Klaksvík
Finn Kjølbro, Klaksvík
Álvur Klakk, Klaksvík
Tummas J. Lervig, Klaksvík
Heini Ósá, Klaksvík
Eli Poulsen, Klaksvík
Jóhan Andrias Reyðberg, Klaksvík
Olivur Thomsen, Klaksvík
Jóhanna á Tjaldrafløtti, Klaksvík
Jógvan Vágsheyg, Klaksvík
Hergerð Ziskason, Klaksvík

**Eystan Múlan**
Absalon í Buð, Hvannasund
Jógvan Sverri Christiansen, Norðdepil
Jógvan Edmund á Geilini, Svínoy
Hanus Súni Hansen, Hattarvík
Kári Kallsberg, Viðareiði
Jákup J. Petersen, Viðareiði

**Kalsoy og Kunoy**
Jógvan Joensen, Trøllanes
Páll Klettskarð, Haraldssund

**Leirvík og Føroyar annars**
Kristian M. Eliasen, Leirvík
Jóannes Hansen, Toftir
Peder T. Haahr, Signabøur
Torbjørn Jacobsen, Glyvrar
Jógvan E. Joensen, Leirvík
Margaret Johannesen, Leirvík
Edmunda Langgaard, Leirvík
Christina Nolsøe, Tórshavn
Jonna Sjúrðarberg, Leirvík

## Umsjónarráð

Óli Marner Christiansen, *formaður*, Klaksvík
Finn Kjølbro, *næstformaður,* Klaksvík
Jógvan Joensen, Trøllanes
Álvur Klakk, Klaksvík
Páll Klettskarð, Haraldssund
Erling Petersen, Klaksvík
Kristian M. Eliasen, *starvsfólkaumboð,* Leirvík
Elmar Poulsen, *starvsfólkaumboð,* Klaksvík
Sigrun Skálagarð, *vald av Búskaparmálaráðnum*, Klaksvík

## Stjórn

Eyðfinn Reyðberg, Klaksvík

## Grannskoðan

Martin Gaard, *løggildugur grannskoðari*, København
Símun Absalonsen, *skrásettur grannskoðari*, Tórshavn
Jákup Olsen, *innanhýsis grannskoðari*, Klaksvík



| *Navn* | *Telefon* | *Telefax* | *Teldupostur* |
|---|---|---|---|
| **Stjórn** | | | |
| Eyðfinn Reyðberg | 475000 | 476000 | eydfinn@ns.fo |
| **Klaksvík** | | | |
| **Avgreiðsludeildin og deildin við Klaksvíksvegin** | | | |
| Ruth Baldvinsson | 475038 | 476000 | ruth@ns.fo |
| Marjun Hansen | 475013 | 476000 | marjuh@ns.fo |
| Sigrun Heimistovu | 475000 | 476000 | sigrun@ns.fo |
| Lív Høgnesen | 475000 | 476000 | liv@ns.fo |
| Rannvá Isaksen | 475000 | 476007 | rannva@ns.fo |
| Anna Müller Jacobsen | 475042 | 476000 | anna@ns.fo |
| Bill McLeod Jacobsen | 475014 | 476000 | bill@ns.fo |
| Betty Joensen | 475000 | 476000 | betty@ns.fo |
| Ingun Joensen | 475000 | 476000 | ingun@ns.fo |
| Bjørg Johannesen | 475039 | 476000 | bjorg@ns.fo |
| Jórun Mathisen | 475000 | 476007 | jorun@ns.fo |
| Hanna Mørkøre | 475011 | 476000 | hanna@ns.fo |
| Ninni Simonsen | 475010 | 476000 | ninni@ns.fo |
| Herfrí Sørensen | 475000 | 476007 | herfri@ns.fo |
| Beinta Vágsheyg | 475000 | 476000 | beinta@ns.fo |
| **Privatkundadeildin** | | | |
| Marjun E. Joensen | 475046 | 476001 | marjunj@ns.fo |
| Annubeth Absalonsen | 475047 | 476001 | annubetha@ns.fo |
| Durid Færø | 475041 | 476001 | durid@ns.fo |
| Thorleif Joensen | 475045 | 476001 | thorleif@ns.fo |
| Petra Nysted | 475051 | 476002 | petra@ns.fo |
| Elmar Poulsen | 475043 | 476001 | elmar@ns.fo |
| Annubeth Sørensen | 475021 | 476001 | annubeths@ns.fo |
| **Vinnudeildin** | | | |
| Eyðun Kjølbro | 475055 | 476002 | eydunk@ns.fo |
| Guðrið Lava Olsen | 475052 | 476002 | gudrid@ns.fo |
| Julianna Thomsen | 475012 | 476002 | julianna@ns.fo |
| **Fyrisiting (kt-, roknskapar- og starvsfólkadeild)** | | | |
| Marner Mortensen | 475070 | 476003 | marner@ns.fo |
| Marianna Hansen | 475069 | 476003 | marianna@ns.fo |
| Eyðun Nolsøe | 475072 | 476003 | eydunn@ns.fo |
| **Marknaðardeildin** | | | |
| Gunnar Nolsøe | 475064 | 476003 | gunnar@ns.fo |
| **Grannskoðanardeildin** | | | |
| Jákup Olsen | 475065 | 476003 | jakup@ns.fo |
| **Norðdepil** | | | |
| Alvilda Simonsen | 452030 | 452036 | alvilda@ns.fo |
| **Viðareiði** | | | |
| Alvilda Simonsen | 451036 | 451165 | alvilda@ns.fo |
| **Leirvík** | | | |
| Kristian Martin Eliasen | 443070 | 443372 | kristianm@ns.fo |
| Mary-Jana á Reynatrøð | 443070 | 443372 | mary-jana@ns.fo |





| Lyklatøl | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 35,9 | 34,9 | 31,0 | 31,0 | 32,5 |
| Kjarnukapitalprosent | 35,9 | 34,9 | 31,0 | 31,0 | 32,5 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 8,3 | 11,5 | 11,4 | 11,1 | 12,5 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 6,5 | 8,7 | 10,2 | 9,0 | 10,3 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,5 | 1,7 | 2,0 | 1,6 | 1,8 |
| Rentuváði | 4,0 | 3,6 | 5,3 | 2,4 | 2,2 |
| Gjaldoyrastøða | 0,2 | 0,2 | 0,3 | 1,0 | 0,5 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 77,6 | 83,1 | 96,0 | 88,5 | 86,5 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 308,8 | 259,8 | 209,1 | 277,8 | 279,9 |
| Stórir kundar tilsamans | 0,0 | 28,9 | 39,1 | 31,6 | 29,6 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,1 | 0,3 | 0,2 | 0,5 | 0,1 |
| Burturleggingarprosent | 6,6 | 6,0 | 4,0 | 3,9 | 3,9 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,6 | 0,1 | -0,8 | 0,8 | 0,6 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 4,8 | 13,3 | 19,5 | 3,5 | 10,1 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,3 | 3,4 | 3,7 | 3,5 | 3,4 |

**Høvuðstøl**
(1.000 DKK)

| | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 36.676 | 38.001 | 40.368 | 46.811 | 51.551 |
| Virðisjavnan | -3.926 | 844 | -5.907 | 1.913 | 2.250 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 875 | 950 | 929 | 888 | 1.236 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **33.625** | **39.795** | **35.390** | **49.612** | **55.037** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 18.372 | 21.359 | 22.562 | 23.746 | 25.682 |
| Avskrivingar, føst ogn | 1.008 | 1.463 | 748 | 972 | 1.056 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 3.123 | 442 | -5.970 | 5.562 | 4.159 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **11.122** | **16.531** | **18.050** | **19.332** | **24.140** |
| Skattur | 2.435 | 4.017 | 1.866 | 3.632 | 4.298 |
| **Ársúrslit** | **8.687** | **12.514** | **16.184** | **15.700** | **19.842** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 451.616 | 511.586 | 611.552 | 632.742 | 696.577 |
| Virðisbrøv | 193.246 | 187.510 | 159.615 | 236.596 | 263.529 |
| Innlán | 622.523 | 652.818 | 662.141 | 744.009 | 836.654 |
| Javni | 772.476 | 816.035 | 838.450 | 938.010 | 1.053.574 |
| Eginpeningur | 137.972 | 150.553 | 167.047 | 182.772 | 202.843 |



# Til ábyrgdarar og viðskiftafólk

Tá tikið verður saman um árið, ið fór, kunnu vit ikki annað enn fegnast um ta framgongd, okkum og samfelag okkara hevur verið fyri.

Fáur mundi, fyri bert nøkrum árum síðani, tora at hugsa um, at føroyska samfelagnum skuldi eydnast, at koma so skjótt á føtur aftur.

Árið í fjør gjørdist eisini gott hjá Norðoya Sparikassa. Avlopið áðrenn skatt gjørdist 24 mió.kr., og knappar 20 mió.kr. eftir skatt. Hetta er samstundis besta úrslitið sparikassin hevur havt.

At tað gongur sparikassanum væl, er avgerandi neyðugt til tess at styrkja um kappingarførið mótvegis okkara kappingarneytum. Einans á henda hátt vil tað eydnast okkum at varðveita Norðoya Sparikassa sum ein sterkan peningastovn, við grundstøði í lokalsamfelagnum.

Norðoya Sparikassi er sum kunnugt ein lokalur peningastovnur. Tí royna vit eisini eftir førimuni at stuðla mentan, ítrótti og øðrum tiltøkum, ið gera lívið her í økinum meira fjølbroytt og spennandi. Tað gleðir okkum at fáa loyvi til at stuðla slíkum virksemi, ikki minst tá vit merkja tann stuðul, sparikassin fær frá tykkum í lokalsamfelagnum.

Tað hevur tí serliga stóran týdning, at vit kunnu bjóða ungdómi okkara fjølbroyttar frítíðar- og ítróttarmøguleikar. Tað er tí at fegnast um, at so væl gekk á mongum økjum í fjør. Uttan at koma hesum nærri, fæst sjón fyri søgn við at lesa um árið, ið fór, á komandi síðum.

1. september 2001 kundu vit bjóða vini okkara Silva vælkomnum til sparikassan. Tað var eingin loyna, at sparikassanum leingi hevði tørvað eina dagføring av barnakontoini, og vit kunnu tí ikki annað enn fegnast um, og takka fyri, góðu móttøkuna Silvi fekk millum tey ungu. Vit hava nú fingið eina góða barnakonto, við nógvum spennandi møguleikum.

Tann 21. desember 2001 var ein merkisdagur, tó at mong kanska ikki góvu hesum ans í øllum jólameldrinum. Tá samtykti Føroya Løgting at seta á stovn P/f Norðoyatunnilin, ið skal standa fyri at fáa fast samband um Leirvíksfjørð. Hetta merkir, at tað verður koyrandi um Leirvíksfjørð um 4 ár. Eingin ivi er um, at hetta verður ein sera stór broyting hjá fólki báðumegin fjørðin. Hóast summi kanska framvegis óttast hvat hetta fer at bera við sær, er neyðugt, at vit øll royna at síggja møguleikarnar heldur enn vansarnar í samband við hetta stóra framstig og longu nú fyrireika okkum til hetta.

Nógv hendir í fíggjarheiminum, og fara vit í summar at bjóða fram møguleikan, at viðskiftafólk kunnu síggja hvat stendur á konto, og gera vanligar flytingar umvegis internetið. Hetta er so enn ein møguleiki, ið kann gera vanliga dagin lættari hjá mongum. Hóast mong kanska kunnu halda, at vit á henda hátt verða enn longur burtur frá hvørjum øðrum, halda vit heldur tvørturímóti, at hetta gevur okkum møguleikan til at koma hvørjum øðrum nærri, tá betri stundir verða til at tosa um onnur viðurskifti, ið hava áhuga hjá viðskiftafólki okkara.

Samfelagshjólini mala nú sera skjótt aftur. Tað er tí avgerandi neyðugt, at øll, ið sita við ábyrgd, kenna sær hógv, tá avgerðir skulu takast um at økja um nýtslu ella íløgur.

Eg vil vegna Norðoya Sparikassa nýta høvi at takka øllum fyri gott samstarv í farna ári. Eisini ein tøkk til starvsfólkið, fyri framúr góða úrslitið sparikassin náddi í fjør.

Vit, sum starvast í Norðoya Sparikassa, vilja gera alt fyri at tú kennir teg í góðum hondum, tá samstarvað verður við Norðoya Sparikassa.

Eg vil tí at enda loyva mær at heita á tykkum, um at siga frá, er okkurt, ið tit halda kundi verið øðrvísi ella betri, ella um okkurt, tit halda vera gott. Við slíkari vegleiðing frá tykkum, ið brúka sparikassan, kann Norðoya Sparikassi gerast ein enn betri peningastovnur okkum øllum at gagni.



Eyðfinn Reyðberg
*sparikassastjóri*





# 2001 í orðum og myndum



*Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri*

**Nýggj telefonskipan**
Mánadagin 22. januar varð farið at royndarkoyra nýggju telefonskipan sparikassans og eftir einar tveir mánaðar, varð faldari við nýggjum telefonnummrum og teldupostbú-støðum almannakunngjørdur á ábyrgdarafundinum fríggjakvøldið 23. mars og sendur øllum húsar-haldum í virkisøki sparikassans vikuna eftir. Og sum nakað nýtt kunnu viðskiftafólk nú eisini ringja og skriva beinleiðis til starvsfólkið, tey vilja samskifta við.

**Álvur Klakk og Páll Klettskarð afturvaldir**
Á umboðsráðsfundi sparikassans fríggjadagin 23. mars vóru Álvur Klakk og Páll Klettskarð, ið báðir stóðu fyri vali, afturvaldir. Eftir umboðsráðsfundin skipaði umsjónarráðið seg við Óla Marneri Christiansen sum formanni og Finni Kjølbro sum næstformanni.

**Ábyrgdarafundurin**
Umleið 750 ábyrgdarar og onnur, ið vóru tengd at tiltakinum, vóru á stóra ábyrgdarafundinum 23. mars.

Og skráin var bæði fjølbroytt og spennandi. Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, og Óli Marner Christiansen, umsjónarráðsformaður, greiddu frá um úrslit, gongd og framtíðarætlanir, Durita Holm hevði áhugaverdan fyrilestur, har hon við støði í ferðini kring knøttin við Sølku Vølku, nam við fleiri áhugaverdar spurningar. Og tónleikur og undirhald var eisini á skránni, meðan Jákup Ziskason meistarliga borðreiddi við einum góðum bita.



*Ninni Simonsen, telefonmóttøkan*



*Álvur Klakk*



*Páll Klettskarð*



Durita Holm



Rasmus Magnussen, Óli Nielsen og Robert McBirnie borgaðu aftur fyri frálíkum undirhaldi. Hesuferð saman við Kim Hansen handan flyglið.



Vísumenn, við Jógvani Hansen, sangur, guitar og fiól, og Hans Hjalta Skaale, sangur og guitar, undirhelt við nýggjum tættum eftir Hans Hjalta Skaale og Andreas Justesen.





17 Sangarar, undir leiðslu av Jógvani við Keldu, sungu m.a. ein nýggjan sang, ið kórleiðarin hevði skrivað til høvið.



Á ábyrgdarafundinum varð sponsoravtala gjørd við Klaksvíkar Róðrarfelag. Eftir avtaluni er Norðoya Sparikassi høvuðsstuðul hjá Klaksvíkar Róðrarfelag komandi trý árini.



Ad Libitum fjálgaði um borðhaldið við sínum sermerkta framberarhátti av m.ø. klassiskum verkum.



Á ábyrgdarafundinum lat Norðoya Sparikassi Klaksvíkar Sløkkiliði eitt sonevnt Fire Flir tól. Tólið, ið er hitasøkjandi, er tað fyrsta í Føroyum av sínum slag. Tólið hevur longu verið í nýtslu, og hevur tað roynst væl.



Eyðun Kjølbro

**Nýggjur leiðari á vinnudeildini**
1. februar tók Eyðun Kjølbro við sum leiðari á vinnudeild sparikassans. Eyðun hevur starvast í sparikassanum síðani september 1995, og hevur umframt vanliga sparikassaútbúgving eisini Fíggjarliga Framhaldsútbúgving.



**Deildin við Stangavegin latið aftur**
5. juli 1993 lat Norðoya Sparikassi sína triðju deild upp í Klaksvík og á sjálvum átta áradegnum varð deildin latin aftur.



*Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, og Herfrí Sørensen, sparikassakvinna, á deildini seinasta dagin opið var.*

Tørvurin á deildum er í dag minni enn fyri átta árum síðani og hetta er ein av orsøkunum til at deildin er latin aftur. Umráðandi er eisini, at sparikassin er tilreiðar at taka við nýggjum avbjóðingum, eitt nú tá talan er um ráðgeving til bæði privat- og vinnukundar.



*Mikudagin 15. august vóru 25 ár liðin, síðani Beinta Vágsheyg tók við starvi í sparikassanum.*



*Klaksvíkar Róðrarfelag*
*Árið royndist væl hjá Klaksvíkar Róðrarfelag. Genturnar á Fípuni Føgru, kvinnurnar á Páll Fanga og mennirnir á Nevinum Reyða gjørdust Føroyameistarar. Somuleiðis vunnu Páll Fangi og Nevið Reyða Ólavsøkuróðrarnar meðan Fípan Fagra gjørdist nummar 2.*



*Hósdagin 13. september vóru 25 ár liðin síðani Marjun E. Joensen, privatkundaleiðari, tók við starvi í Norðoya Sparikassa.*



*Sum eina viðurkenning av dygdararbeiði felagsins, lat Norðoya Sparikassi Klaksvíkar Róðrarfelag nýggja 5 mannafarið Fípuna Føgru.*



*Síðani 1998 hevur besta 10 mannafarsmanningin luttikið í HM kappingini í Gigrowing, ið verður hildin á Scilly oyggjunum, og síðani 2000 hevur ein kvinnumanning somuleiðis luttikið. Her síggja vit føroyameistararnar 2001, kvinnurnar á Páll Fanga, venja umborð á Brendan til kappingina í 2002.*





**Silvi komin**
Nógv fólk vóru samankomin, tá Silvi um 11 tíðina leygarmorgunin 1. september kom til Leirvíkar. Saman við Klaksvíkar Hornorkestri, LÍF, Klaksvíkar Fimleikarfelag o.ø. varð farið í skrúðgongu suður um sparikassan, har tikið varð ímóti við sangi, tónleiki, klovnum o.ø. Seinrapartin fór Silvi til Klaksvíkar, har kappróðrarbátar tóku ímóti, áðrenn stóra skrúðgongan, við m.ø. Klaksvíkar Hornorkestri, Klaksvíkar Fimleikarfelag, KÍ ungdómshópinum og 1. deild kvinnum, Svimjifelagnum Ægir o.ø., fór niðan á fótbóltsvøllin.

**Og hvør er so Silvi?**
Saman við mammu og pápa sínum býr Silvi í Oyravík, sum er inni í Oyrafjalli. Mamman eitur Fima, hon er webdesignari og ger heimasíður o.a, meðan pápin, Haruper, er bakari. Fima situr ofta og teknar og Silva dámar væl at tekna saman við henni. Pápin dugir ikki so væl at tekna, men hann dugir væl at spæla saxofon, og tá hann spælir, plaga mamman og Silvi at lurta.

Ofta, tá Silvi hevur frí, vitjar hann abba sín, Andrias Vitameistara, ið býr úti á vitanum saman við ommu Silva, Malenu, og hundinum Snar. Vitin er bygdur á eina gamla sjórænaraborg, og tí eru nógvar loynigongir, ið føra til ymisk støð. Ein teirra gongur til Klaksvíkar. Hetta finnur Silvi út av, einaferð hann er farin kanningarferð – men hetta vita hini ikki.

Ein onnur loynigongd – ein undirsjóvartunnil - gongur til Leirvíkar, men hesa hevur ongin funnið enn. Miðskeiðis í hesum tunnli er ein glaskupil, har tú kanst síggja hvat fyriferst á havsins botni, men kupilin er so snildisliga gjørdur, at tú neyvan sært inn gjøgnum hann, enn minni hvar hann er.

**Silvakonto**
Silvakonto er spennandi, og saman við Silva er tað stuttligt at spara upp. M.a. fært tú, hvørja ferð tú tømir Silva, okkurt serligt frá sparikassanum umframt hægstu rentu.

Silvakontoin vendur sær til øll, ið eru yngri enn 13 ár. Og bæði børn, foreldur, ommur og abbar kunnu stovna Silvakonto.

**Silvafløgan**
Fyrsta mánadagin í desember kom nýggja Silvafløgan. Á fløguni eru fýra løg, eitt remix, fýra karaokeútsetingar og eitt videolag.

Kári Jacobsen hevur skrivað allar sangirnar, eins og hann somuleiðis er at finna handan tangentar og foritan, meðan Linda MacDonald syngur allar røddir. Eisini er Leivur Thomsen at finna á guitar, Jacob Glæsner á bass og Dan Fauerholdt á tangentum. Kári Jacobsen hevur eisini, saman við Dan Fauerholdt og Jacob Duus, lagt fløguna til rættis, meðan Björn Engelmann, ið eitt nú hevur mastrað fløgur fyri bólkar sum Aqua og Westlife, hevur mastrað Silvafløguna. Videoupptøkurnar eru gjørdar av Ólavi Wolles og WHR-Studio, meðan Grafik Studio hevur klipt og sett saman.



*Linda MacDonald*





*KÍ kvinnurnar saman við Silva*





*KÍ-unglingarnir*
*Mikukvøldið 27. juni vunnu KÍ unglingarnir steypafinaluna 7-2 móti ÍF. Unglingarnir gjørdust somuleiðis silvurvinnarar í landskappingini.*



*Stóri sigursharrin var Hjalgrím Elttør, ið skjeyt fimm mál.*



*Model av Polarfarinum, sum Hans Jacob Fuglø hevur gjørt til deild sparikassans í Leirvík*



*Fríggjakvøldið 21. september helt sparikassin á fyrsta sinni kunnandi umboðsráðsfundin í Leirvík. Eftir fundin lat sparikassin Bygdahúsinum í Leirvík peningagávu, ið Kristianna Joensen, formaður í bygdahúsfelagnum, tók ímóti.*

**Sparikassin høvuðsstuðul hjá 1. deildarkvinnunum hjá KÍ**

Umframt at vera stuðul hjá øllum ungdómshópinum hjá KÍ, er sparikassin nú eisini høvuðsstuðul hjá 1. deild kvinnum. Og árið gjørdist gott fyri kvinnurnar, ið gjørdust Føroyameistarar, umframt at tær stóðu seg væl í Europacupkappingini. Í døgunum 3., 5. og 7. oktober spældu tær ímóti ávíkavist eysturríkska meistarunum Landhaus, finsku meistarunum HJK-Helsinki og italsku meistarunum Torres. KÍ kvinnurnar vunnu dystin móti Landhaus 2-1, meðan tær taptu 4-0 móti HJK-Helsinki og Torres.

Harumframt gjørdist Jón Harald Poulsen »Ársins venjari«, Anna Müller Jacobsen, ið er annar av barna- og ungdómsráðgevarum sparikassans, »Ársins málverji«, meðan Kristina Eyðbjørnsdóttir gjørdist »Ársins leikari« umframt at hon vann »Gylta skógvin« sum besti málskjútti.





*Vikuskiftið 23. 24. og 25. november var sparikassin við á sølustevnu í Klaksvík*









*Silvi varð væl fagnaður á sølu-stevnuni.*





*Føroya Symfoniorkestur*



*Sparikassin var høvuðsstuðul, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag, við 44 ára millumbili, á triðja sinni framførdi skemtileikin Mostir Charley*

*Nakrar útgávur, ið Norðoya Sparikassi hevur stuðlað í 2001*



**Sparikassin stuðlar**

Umframt eitt virki vinnulív, hevur útboðið av frítíðarvirksemi umframt tey hugskot, ið hvør sær kann fáast við, alstóran týdning fyri eitthvørt samfelag, tað veri seg lítið, stórt ella lokalt. Sparikassin telist ofta millum stuðlarnar, og millum tey, ið sparikassin hevur stuðlað farna árið, eru m.a. hesi:

Bókadeild Føroya Lærarafelags; Burturhugur - Faroese Observations, dokumentarfilmur um Hattarvík; CISV Føroyar; Dagtilhaldið í Klaksvík; Deyvafelag Føroya; Felagið fyri hoyribrekað; Fimleikarfelagið Fok; Flogbóltssamband Føroya; Føroya KFUK Skótar; Føroya Symfoniorkestur; Føroyska Sjómanskirkjan; Grunnurin Dragin; Hjartafelagið; Hornorkestur Frelsunarhersins; Felagið Javni; Leirvíkar Gentukór; LÍF; KÍ; Klaksvíkar Brigdefelag; Klaksvíkar Fimleikarfelag; Klaksvíkar Hornorkestur; Klaksvíkar Húsmøðrafelag; Klaksvíkar Sjónleikarfelag; Klaksvíkar Talvfelag; Landsfelagið Slái Ring; Meginfelag Áhugaleikara Føroya; Mjølnir; Reyði Krossur Føroyar; Rumeniahjálpin; Seyðasýningin í Klaksvík; Sinnisbati; Síl í Ósánni; Svimjifelagið Ægir; og Guttorm Sørensen.




**Tónleikagrunnur Norðoya Sparikassa**

Tónleikagrunnur Norðoya Sparikassa, ið við peningagávu hevur til endamáls at stuðla og menna føroyskt tónleikalív, játtaði í 2001 sjey umsóknir, harav ein er endaliga liðug.

Talan er um fløguna ’Sum tjóvur á nátt’ hjá rockbólkinum Chase. Á fløguni, sum kom út týsdagin 11. desember, eru 11 løg, 6 teirra eru skrivaði av Edmundi Jacobsen, meðan Niclas Johannesen eigur hini 5. Fløgan er produserað av Niclasi Johannesen, meðan Óli Poulsen hevur ljóðblandað.



# Ársfrágreiðing

Árið 2001 gjørdist gott hjá Norðoya Sparikassa. Ársroknskapurin vísir eitt avlop áðrenn skatt uppá 24,1 mió.kr., ímóti 19,3 mió.kr. í 2000. Endaliga ársúrslitið, eftir skatt, gjørdist 19,8 mió.kr. ímóti 15,7 mió.kr. í 2000.

Netto rentuinntøkurnar øktust úr 44,9 mió.kr. til 49,2 mió.kr. Hesin vøkstur stavar frá, at sparikassin hevur havt betri gjaldføri, og hevur økt um lánsbrævagoymsluna. Meirinntøkan í 2001 av gjaldførinum hevur verið 5,5 mió.kr. í mun til 2000.

Kostnaðarinntøkurnar eru eitt sindur hægri í 2001 enn í 2000. Tað tykist sum altsamt fleiri velja at gjalda afturvendandi gjøld sum fasta flyting, ið samstundis er ókeypis. Av somu orsøk vaksa hesar inntøkur bert smávegis.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru 51,6 mió.kr. í 2001 ímóti 46,8 mió.kr. í 2000, ein vøkstur uppá 4,8 mió.kr. ella 10,1 %.

Sparikassin hevði aftur í 2001 ein vinning av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra, og var hesin 2,3 mió.kr., ið er eitt vet meir enn í 2000, tá hann var 1,9 mió.kr. Skakandi hendingin í USA 11. september hevði við sær, at tjóðbankar um allan heimin lækkaðu renturnar í heyst, og gav hetta ein kursvinning av lánsbrøvum.

Sparikassin hevði í 2001 ætlanir um, í ávísan mun at gera íløgur í partabrøv, men valdu tó at bíða. Hetta var heppið, tá partabrøv í árinum, ið fór, eru fallin munandi í virði. Avgerð er ikki tikin enn, nær sparikassin skal gera íløgur í partabrøv.

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 25,3 mió.kr. í 2001 ímóti 23,5 mió.kr. í 2000, ella ein vøkstur uppá 1,8 mió.kr., sum svarar til ein vøkstur uppá 7,6%. Hesin vøkstur stavar frá, at sparikassin í 2001 hevði serlig átøk, harav tað stórsta var nýggja Silvakontoin til børn.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru í 2001 góðar 1 mió. kr., ið er tað sama sum í 2000.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá útlán vóru 4,2 mió.kr. í 2001 móti 5,6 mió.kr. í 2000. Sparikassin merkir at tíðirnar í dag eru góðar, og at mong hava tað meira rúmsátt fíggjarliga.

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er sera gott. Við árslok 2001 var gjaldførið 330 mió.kr. móti 289 mió.kr. í 2000. Hetta er 127% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans er hetta 38%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans er framvegis góður, og er hann nú 32,5%. Við árslok 2000 var hann 31%. Lógin krevur 8%.

Við árslok 2001 vóru útlán sparikassans 697 mió.kr. og eru tey í árinum vaksin við 10,1%. Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 12,5% og er nú 837 mió.kr. Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 1.054 mió.kr., og svarar hetta til ein vøkstur í fíggjarstøðuni uppá 12,3%.

Eginpeningur sparikassans er nú 202,8 mió.kr. Sparikassin hevði í 2001 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 12,5%.

Í 2001 var starvsfólkatalið í sparikassanum 32,4 umroknað til fulla tíð, ímóti 34,4 fólkum í 2000.

Eftir árslok eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarstøðu sparikassans.

Umsjónarráðið skjýtur upp, at av ársúrslitinum 19,8 mió.kr. saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum 180,2 mió.kr. og gávugrunninum 1 mió.kr., ella íalt tkr. 200.026, verða lagdar 1 mió.kr. í gávugrunnin, og tkr. 199.026 verða fluttar til næsta ár.

Tá vit seinasta ár mettu, at úrslitið í 2001 fór at verða heldur betri enn í 2000, var henda meting gjørd út frá, at positiva gongdin í fiskivinnuni, bæði á sjógvi og á landi, helt fram. Staðfestast kann nú, at so var. Tá metast skal um árið 2002, kunnu vit ikki annað enn taka somu atlit, og vóna at henda positiva gongd kemur at halda sær. Um so er, kunnu vit rokna við, at úrslit sparikassans 2002 verður framímót eins gott, sum í 2001.



Umsjónarráð og stjórn Norðoya Sparikassa hevur í dag viðgjørt og góðtikið ársroknskapin fyri 2001, ið vit viðmæla til aðalfundin at góðkenna.

Klaksvík, hin 5. februar 2002

**Stjórn**

Eyðfinn Reyðberg

**Umsjónarráð**

| | | |
|---|---|---|
| Óli Marner Christiansen<br>*formaður* | Finn Kjølbro<br>*næstformaður* | Jógvan Joensen |
| Álvur Klakk | Páll Klettskarð | Erling Petersen |
| Kristian Martin Eliasen | Elmar Poulsen | Sigrun Skálagarð |





**Innanhýsis grannskoðan**
Eg havi luttikið í grannskoðanini av ársroknskapinum fyri 2001 hjá Norðoya Sparikassa, ið er greiddur av leiðsluni.

**Grannskoðanin**
Grannskoðanin er framd við støði í grannskoðanarkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um grannskoðan av fíggjarstovnum og fíggjarsamtøkum og eftir vanligum viðurkendum grannskoðanarreglum. Grannskoðanin hevur umfatað tær uppgávur, ið eru álagdar mær sambært gjørdari avtalu við valdu grannskoðarnar um býti av grannskoðarauppgávunum fyri 2001. Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Klaksvík, hin 5. februar 2002

Jákup Olsen
*innanhýsis grannskoðari*

**Umboðsráðsvaldu grannskoðararnir**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin 2001 hjá Norðoya Sparikassa, greiddur av leiðsluni.

**Grannskoðanin**
Vit hava í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarreglur skipað og framt grannskoðanina við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin er uttan týðandi villur ella væntar týðandi upplýsingar. Undir grannskoðanini hava vit eftir eini meting um týdning og tapsvanda kannað grundarlagið og prógv fyri tær í roknskapinum nevndu upphæddir og aðrar upplýsingar. Vit hava samstundis tikið støðu til tann av leiðsluni valda roknskaparhátt og roknskaparligu metingar, eins og vit hava mett um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Tann framda grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til nakað fyrivarni.

**Niðurstøða**
Okkara fatan er, at ársroknskapurin er í tráð við tey krøv, ið lóggávan setur til roknskaparframløgu, og at roknskapurin gevur eina rætta mynd av sparikassans ogn og skuld, fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

København, hin 5. februar 2002

Martin Gaard
*løggildugur grannskoðari*

Tórshavn, hin 5. februar 2002

Símun Absalonsen
*skrásettur grannskoðari*

| Viðm. | | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 74.975 | 65.202 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 25.732 | 20.344 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **49.243** | **44.858** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 41 | 35 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.350 | 2.000 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 83 | 82 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **51.551** | **46.811** |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 2.250 | 1.913 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 1.236 | 888 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 25.330 | 23.533 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.056 | 972 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 352 | 213 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.159 | 5.562 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **24.140** | **19.332** |
| 23 | Skattur | 4.298 | 3.632 |
| | **Ársúrslit** | **19.842** | **15.700** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| | Ársúrslit | 19.842 | 15.700 |
| | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 500 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 179.184 | 163.984 |
| | **Til taks tilsamans** | **200.026** | **180.184** |
| | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| | At flyta til næsta ár | 199.026 | 179.184 |
| | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **200.026** | **180.184** |

| viðm. | | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 5.522 | 5.573 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 71.083 | 47.511 |
| 9/20 | Útlán | 696.577 | 632.742 |
| 10 | Lánsbrøv | 263.529 | 235.875 |
| 11 | Partabrøv o.a. | 921 | 721 |
| 12 | Ítøkiligar ognir | 10.398 | 11.639 |
| 13 | Aðrar ognir | 5.534 | 3.949 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.053.564** | **938.010** |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| 15 | Innlán | 836.654 | 744.009 |
| | Onnur skuld | 11.236 | 8.454 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 2.831 | 2.775 |
| | **Skuld tilsamans** | **850.721** | **755.238** |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | 2.817 | 2.588 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 179.184 | 163.484 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 19.842 | 15.700 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **202.843** | **182.772** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.053.564** | **938.010** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 17.143 | 9.651 |
| | Aðrar ábyrgdir | 5.424 | 8.049 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **22.567** | **17.700** |





| | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.588 | 2.563 |
| Tilgongd í árinum | 249 | 58 |
| Frágongd í árinum | 20 | 33 |
| **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **2.817** | **2.588** |
| Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 500 |
| Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 500 |
| Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 1.000 |
| **Gávugrunnur við ársenda** | **1.000** | **1.000** |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 179.184 | 163.984 |
| Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | -500 |
| Flutt frá ársúrsliti | 19.842 | 15.700 |
| **Flutt avlop við ársenda** | **199.026** | **179.184** |
| **Eginpeningur tilsamans** | **202.843** | **182.772** |
| **Solvensuppgerð** | | |
| Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 202.843 | 182.772 |
| Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 202.843 | 182.772 |
| Vektaðar ognir ikki íroknaðar handilsgoymslu | 547.758 | 483.724 |
| Vektaði tøl undir strikuni | 11.310 | 5.773 |
| Vektaði tøl við marknaðarváða | 65.116 | 100.968 |
| **Vektaði tøl tilsamans** | **624.184** | **590.465** |
| Solvensprosent sambært BSL §21, stk.1 | 32,5% | 31,0% |
| Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosent av vektaðum tølum tilsamans | 32,5% | 31,0% |



# *Peningastreymsroknskapur*

| | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Rakstur** | | |
| Ársúrslit eftir skatt | 19.842 | 15.700 |
| Broytingar viðv- upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.056 | 972 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.159 | 5.562 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 56 | 444 |
| **Íalt frá rakstri** | **25.113** | **22.678** |
| **Rakstrarkapitalur** | | |
| Útlán | -67.994 | -26.752 |
| Innlán | 92.645 | 81.868 |
| Aðrar ognir | -1.585 | -605 |
| Onnur skuld | 2.782 | 3.638 |
| **Íalt frá rakstrarkapitali** | **25.848** | **58.149** |
| **Íløgur** | | |
| Lánsbrøv | -27.654 | -76.902 |
| Partabrøv | -200 | -79 |
| Ítøkiligar ognir | 185 | -1.189 |
| **Íalt frá íløgum** | **-27.669** | **-78.170** |
| **Fígging** | | |
| Ábyrgdarpeningur | 229 | 25 |
| Broytingar í gjaldføri | 23.521 | 2.682 |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 53.084 | 50.402 |
| **Gjaldføri við ársenda** | **76.605** | **53.084** |





| Viðm. | | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 3.009 | 2.498 |
| | Útlán | 56.773 | 53.030 |
| | Lánsbrøv | 15.193 | 9.674 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **74.975** | **65.202** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 36 |
| | Innlán | 25.602 | 20.193 |
| | Ábyrgdarpeningur | 130 | 115 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **25.732** | **20.344** |
| 3 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 2.201 | 1.856 |
| | Gjaldoyra | 49 | 57 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **2.250** | **1.913** |
| 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 505 | 531 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 731 | 357 |
| | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **1.236** | **888** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| | Løn og samsýning til umsjónarráð | 300 | 277 |
| | Løn og samsýning til stjórn | 647 | 1.793 |
| | Løn til starvsfólk | 9.228 | 8.938 |
| | Eftirløn | 1.135 | 1.554 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 763 | 804 |
| | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **12.073** | **13.366** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 13.257 | 10.167 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **25.330** | **23.533** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 32,4 | 34,4 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **352** | **469** |
| | - Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 75 | 100 |
| 6 | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 303 | 303 |
| | Maskinur og innbúgv | 753 | 669 |
| | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **1.056** | **972** |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 352 | 213 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **352** | **213** |



| viðm. | | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 60.583 | 47.511 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 10.500 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **71.083** | **47.511** |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 8.496 | 9.234 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 41.118 | 32.746 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 78.994 | 64.833 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 241.818 | 195.096 |
| | Yvir 5 ár | 326.151 | 330.833 |
| | **Útlán tilsamans** | **696.577** | **632.742** |
| | Akkumuleraðar burturleggingar | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 28.549 | 26.296 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **28.549** | **26.296** |
| | Akkumuleraðar burturleggingar í % av bruttoútlánum við ársenda | 3,9% | 3,9% |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | **439** | **3.156** |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | **Børsskrásett** | **263.529** | **235.875** |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | **Onnur** | **921** | **721** |
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 263.529 | 235.875 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | 967 | 1.331 |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 16.517 | 16.580 |
| | Tilgongd | 0 | 149 |
| | Frágongd | 415 | 212 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **16.102** | **16.517** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 7.792 | 7.506 |
| | Avskrivingar í árinum | 303 | 303 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 17 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **8.095** | **7.792** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **8.007** | **8.725** |

| Viðm. | | 2001<br>1.000 DKK | 2000<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | **Ítøkiligar ognir** (framhald) | | |
| | **Maskinur og innbúgv** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 8.175 | 6.940 |
| | Tilgongd | 230 | 1.235 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **8.405** | **8.175** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 5.261 | 4.592 |
| | Avskrivingar í árinum | 753 | 669 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **6.014** | **5.261** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **2.391** | **2.914** |
| | **Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans** | **10.398** | **11.639** |
| 13 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 4.656 | 3.642 |
| | Aðrar ognir | 878 | 307 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **5.534** | **3.949** |
| 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | **Uttan uppsøgn** | 0 | 0 |
| 15 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 260.214 | 235.343 |
| | Við uppsøgn | 526.293 | 466.555 |
| | Serinnlán | 50.147 | 42.111 |
| | **Innlán tilsamans** | **836.654** | **744.009** |
| | Uttan uppsøgn | 260.214 | 235.343 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 19.616 | 12.426 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 518.646 | 463.443 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 7.635 | 7.645 |
| | Yvir 5 ár | 30.543 | 25.152 |
| | **Innlán tilsamans** | **836.654** | **744.009** |
| 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| | **Treytaleys eftirlønartilsøgn** | **2.831** | **2.775** |
| 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.588 | 2.563 |
| | Tilgongd, netto | 229 | 25 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **2.817** | **2.588** |



| viðm. | | 2001 1.000 DKK | 2000 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 0 | 73 |
| | Aðrar ábyrgdir | 17.143 | 9.578 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 5.424 | 8.049 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **22.567** | **17.700** |
| 19 | **Stjórn og umsjónarráð** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir stovnað fyri stjórn og umsjónarráð sparikassans | | |
| | Stjórn | 1.033 | 1.061 |
| | Umsjónarráð | 3.496 | 3.812 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 1.090 | 1.090 |
| | Umsjónarráð | 5.228 | 5.648 |
| 20 | **Kredittváðar – Útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | Almennir myndugleikar | 2 | 2 |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 5 | 6 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 8 | 10 |
| | Byggivinna | 3 | 1 |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 5 | 5 |
| | Flutningur, postur og telefon | 1 | 1 |
| | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 4 | 3 |
| | Aðrar vinnur | 1 | 1 |
| | **Vinnur tilsamans** | **27** | **27** |
| | Privat | 71 | 71 |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 933 | 1.774 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 346 | 1.444 |
| | Gjaldoyraábending | 933 | 1.774 |
| | Gjaldoyrábending í % av kjarnukapitali aftaná frádrøg | 0,5 | 1,0 |
| 22 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum – alt í DKK | 4.391 | 4.368 |
| 23 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 4.864 | 3.632 |
| | Útsettur skattur | -572 | 0 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 6 | 0 |
| | **Tilsamans** | **4.298** | **3.632** |



# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2001 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a. umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Í samsvari við nýggju roknskaparkunngerðina frá Fíggjareftirlitinum, eru hesar broytingar gjørdar í roknskaparháttinum.

Í 2001 er virðið av skattligum ognum, har útlit eru til at hesi verða nýtt í framtíðini, bókað undir aðra ogn og mótroknað skattinum.

Annars er roknskaparhátturin tann sami, sum varð nýttur í 2000. Samanlíkningartølini fyri 2000 og 2001 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

**Tíðaravmarkingar**
Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

**Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum**
Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

**Útlán og onnur áogn**
Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivað fult út.

**Láns- og partabrøv**
Goymsla sparikassans av børsskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2001.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið øll eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

**Fastar ognir**
Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.

Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í sambandi við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

**Maskinur og innbúgv**
Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

**Fremmant gjaldoyra**
Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

**Innlán og onnur skuld**
Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

**Skattur**
Skattur av ársinntøkuni, við frádrátti av virði av skattligum ognum, er útreiðsluførdur.

## Silvi kemur























VASTI 457171 / PRENT: NORÐOYA REKLAMA